


petur & petur • 320870

# Smakkroyndir av turrum kjøti

## 7 bøndur sýna fram - á Hotel Føroyum 25. februar 2005

Hotel Føroyar skipar fyri hugnakvøldi, har turt kjøt verður sett á dagsskránna. Tiltakið verður fríggjakvøldið 25. februar 2005 klokkan 19.00.

**Bøndurnir, sum fara at sýna fram, eru:**
- Lars Gunnar Dahl-Olsen, Saksun
- Páll Dalsgaard, Skálavík
- Eddie Lauritsen, Mykines
- Róin Schrøter, Hvalba
- Olaf í Garði, Eiði
- Karl Heri Joensen, Klaksvík
- Júst Rubeksen, Tórshavn.



Borðhaldið byrjar við smakking, har gestirnir fáa ein borðisk við 7 stykkjum av turrum kjøti. Gestirnir geva kjøtinum stig og verða 3 tey bestu tjógvini kosin hetta kvøldið.

Fyrr um dagin hevur ein bólkur av serfrøðingum saman við teimum 7 bóndunum ment eitt smakkskema og smakka kjøtið við leiðbeining frá Starvstovuni.

Aftaná smakkroyndirnar verður stórt kalt borð við m.a. serrættum frá bóndunum. Eisini borðreiðir Glasstovan við feskum og ræstum lambskjøti við onkrum søtum omaná.

Borðstjórar verða Rasmus Magnussen og Robert McBirnie. Finnur Hansen spælir klaver. Jóan Pauli Joensen hugleiðir um føroyska matmentan og leggur úrslitini av smakkroyndunum fram. Aftaná borðhaldið verður dansur.

Prísurin fyri tiltakið er kr. 525,- fyri hvønn.
Prísurin við gisting er kr. 1.595,- fyri tvey.

**Við í prísinum er:**
- Duratortil
- Vælkomudrykkur
- Smakkroyndir
- Stórt kalt „seyðaborð"
- Øl, knavi og kaffi við borðið
- Dansur

Bíleggið pláss á 317500.

Vit skapa góð minni.

Hotel Føroyar ★★★★

Tel 31 75 00



# Peningastovnarnir um jólini

***Peningastovnarnir eru afturlatnir jólaaftan og nýggjársaftan***

Seinasta freist at gera lønarflytingar og aðrar flytingar í avgreiðsluni hjá peningastovnunum, Net- og HeimaBankanum ella HeimaGreiðsluni, er 30. desember.

Skal peningur flytast frá kunda í einum peningastovni til kunda í øðrum peningastovni, skal flytingin gerast í seinasta lagi 29. desember. Sama er galdandi fyri flytingar til útheimin. Hesar skulu tó verða peningastovninum í hendi innan kl. 11.00 henda dag.

Lønarflytingar og vanligar flytingar, sum eru skrásettar at fara fram í HeimaBankanum ella HeimaGreiðsluni 31. desember, verða í staðin fluttar til 30. desember.

**FØROYSKU PENINGASTOVNARNIR**